# Gera politikarar sær dælt av teim avvarðandi?

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



10. oktober var altjóða psykiatridagur. Ein einastandandi væl fyriskipaður og áhugaverdur dagur – stórt rós til fyrireikararnar! Alskyns áhugaverd, gleðilig og kunnandi átøk vóru hendan dagin. Tað er so kveikjandi at uppliva áræðið hjá starvsfólkunum har. Átøkini fyri sjúk, avvarðandi og starvsfólk eru einastandandi. Eftirútbúgvingar, starvfólk við alskyns førleikum eisini við brúkarafortreytum, átøk í mun til avvarðandi, verkætlanir er bert nakað av tí sum hent er seinastu tíðina. Ein fegnast við teimum.

Men sum politikari fái eg kortini ein knút í búkin, tá eg hugsi um fysisku karmarnar hjá psykiatriska deplinum. Undanfarna Trivnaðarnevnd Løgtingsins var og vitjaði á deplinum fyri stuttum. Veit at flestøll vóru skelkaði av fysisku umstøðunum á deildunum. Gamalt, niðurslitið, felags baðirúm, 2 – 4 persónsseingjarstovur. Helst hugsaðu vit øll "Tað krevur eina góða heilsu at vera innlagdur her!"

At nútímasgera psykiatriska depilin nú, MÁ eftir mínum tykki vera ein raðfesting, alt tingið kann semjast um. So mín vón er, at landsstýrimaðurin í heilsumálum tvíheldur um, at psykiatriski depilin í langtíðaríløguætlanini stendur fyri tørni nú.

**Sálarsjúku børnini**

Allur bati bøtur og sjálvsagt var gott, at peningur fekst til vega til barna og ungdómspsykiatriina á fíggjarlógini 2008. Trupulleikin er, at peningurin ikki røkkur longur enn til at diagnostisera børnini. Havi eisini skilt, at fleiri av børnunum, sum hava ávísar diagnosir verða send av landinum. Helt, at vit fóru burtur frá hesu loysn fyri fleiri ártíggjum síðan. Hvussu kann eitt samfelag sum ikki rúmar teim sálarsjúku, enn tá børnunum kalla seg eitt vælferðarsamfelag? Tá er talan veruliga um eitt fátækt samfelag. Eitt samfelag uttan fjølbroytni er fátækt.

Mær er komið fyri oyrað, at tað kostar meir enn eina millión fyri hvørt barnið at senda tey av landinum. Eina millión fyri hvørt barnið! Hví ikki geva børnunum møguleikan HER. Gera eindir til børn við serligum tørvi her á landi, so tey ikki skulu úr tí umhvørvinum, har tey kenna seg mest trygg, nærumhvørvið rúmar teimum og hevur umsorgan fyri teimum og familjan trívist væl. Familjurnar fara við tungum huga avstað – tí tað er her tey helst vilja vera vera. Hjá teimum, sum tey eru best við. Samstundis stendur fólkatalið í stað – kann tað undra nakran?

Um vit hugsa í krónum og oyrum eru tað nógvar milliónir vit lata av landinum fyri hesi børn um framt at barnið, sum kundi ment seg her, systkini sum kundu vaksið upp her – og foreldrini sum eru dýrabar arbeiðsmegi og skattgjaldarir – vit lata tey fara!

**Økispsykiatriin**

Økispsykiatriin er nú farin til verka í Eysturoy og Streymoy. Endamálið – um peningur er tøkur – er at hava eina vælvirkandi økispsykiatri um alt landið. Gott er sjálvsagt, at sjúklingarnir kunnu fáa hjálp í nærumhvørvinum. Men ein sannroynd er eisini, at jú fyrr ein sálarsjúlur fær hjálp, tess betri. Við økispskykiatriini er hjálpin tøk í nærumhvørvinum og fólk kunnu fáa viðgerð skjótari. Eisini fyribyrgir og styttir økispsykiatriin inleggingarnar. Og, hóast alt ikki eigur at snúgva seg um krónur og oyru er ein sannroynd at peningur skal til. Hinvegin, ein innlegging kostar fleiri túsund krónur um dagin. So eingin ivi er um, at vit við at játta pening til økispsykiatriina eisini fáa færri og styttri inleggingar og tá sparir heilsuverkið pening. So tað kann bara vera ein góða íløga at hava eina vælvikandi økispsykiatri.

**Avvarðandi hjá sálarsjúkum**

Annlis Bjarkhamar fekk hugskotið og legði verkætlanina "At síggja við hjartanum" til rættis. Hon hevur tosað við 30 føroyingar sum eru avvarðandi at sálarsjúkum - makar, systkin, foreldur at sálarsjúkum. Hárreisandi at lesa, hvussu lítla hjálp tey hava fingið, eisini tí at økið ikki er raðfest politiskt. Men tíbetur hava tey eisini alskyns uppskot um, hvat skal til, til tess at bøta um korini hjá teimum og teim sálarsjúku tey varða av. Nakað av tí tey ynskja er undirvísing til avvarðandi um sálarsjúku, og hvussu tey ansa eftir sær sjálvum til tess at hava orkuna til at vera um og skilja hin sálarsjúka. Tað hevði avgjørt bøtt um korini hjá teim avvarðandi, yvirskotið at vera um og stuðla tí sum er sálarsjúkur – ja, betri lívsdygd til báðar partar. Fakfólk eru sum undirvísa teim avvarðandi, men at bíðilistin er langur.

Ein avvarðandi segði í prátinum við Annlis Bjarkhamar, at politikararnir gera sær dælt av teim avvarðandi. Er tað so, kunnu vit spyrja. Og hondina á hjarta: ja, kanska hugburðurin ofta tykist vera at: So leingi vit ikki fyrihalda okkum til ein trupulleika finst hann ikki. Tí er so gott at hendan verkætlanin vónandi hevur latið eygu okkara upp. Lat okkum vísa teimum, at vit hoyra, fata og raðfesta boðskapin um, hvør tørvurin er. Lat okkum tryggja, at tað er seinastu ferð vit hava hoyrt avvarðandi siga:: "Eg havi eina djúpa sorg, og eingin hjálpir mær at viðgera hana!" "Tú gongur sum avvarðandi allatíð og ert bangin." "Eg kann ikki sleppa, tí hvør tekur yvir?" Hesi eru bert nøkur av rámandi orðunum hjá teim avvarðandi úr frálíka bókinum: "At síggja við hjartanum"

Vónandi ber fíggjarlógin fyri komandi ár brá av, at vit ikki gera okkum dælt av teim avvarðandi, og at vit veruliga ynskja ábøtur innan økið.

# Ábyrgd av egnum fíggjarviðurskiftum

BJØRT SAMUELSEN



**Heimsfevnandi fíggjarkreppan ger tað meira aktuelt enn nakrantíð at hava innlit í og skil á fíggjarkervinum. Viðgerðin av bankatrygdarnetinun vísti greitt, at vit als ikki hava ta ávirkan og ábyrgd, vit eiga at hava av okkara egnu fíggjarviðurskiftum**

Fólkatingið og Løgtingið samtyktu í farnu viku sonevnda bankatrygdarnetið. Hetta fekk fólkatingslimin Edmund Joensen at stórfegnast um, at tosið um føroyskt fíggjareftirlit er tagnað. Men júst viðgerðin av trygdarskipanini vísti heilt greitt, hvussu langt vit eru frá at hava neyðugt innlit í og avgerandi ávirkan á okkara egna fíggjarkervi. Tað er ein álvarsom støða.

**Eingi fingramerki**

Føroysku bankarnir ynsktu at gerast partar av bankatrygdarskipanini. Tjóðveldi tók undir við hesum, men vístu vit samstundis á eina røð av spurningum og óavgreiddum viðurskiftum. Tá føroysku bankarnir eru partur av skipanini, áttu føroysku myndugleikarnir sjálvsagt at verið við í arbeiðinum at orða lógina. Men, sum tað kom fram í Løgtinginum, so hevur bert hissini samband verið millum føroysku og donsku myndugleikarnar um málið, og tí vóru eingi føroysk fingramerki at hóma í lógini.

Á leið 150 bankar eru við í skipanini, og kunnu hesir í mesta lagi koma at gjalda 35 milliardir krónur til samans. Henda upphædd varð sett sum 2% av donsku BTÚ. Føroysku bankarnir koma eftir hesum leisti í ringasta føri at gjalda nærri eina hálva milliard krónur til skipanina, sum er lutfalsliga nógv.

Verður tørvurin størri enn 35 mia, ber danski staturin restina av útreiðslunum. Tá føroyskir bankar nú gerast partar av skipanini, merkir tað so eisini, at landskassin kemur at bera sín lutfalsliga part, um kravið til grunnin verður hægri enn 35 mia? Um so er, hvat kemur hetta at merkja fyri landskassan?

Trygdarskipanin skal eftir ætlan virka í tvey ár. Um pengarnir í grunninum ikki verða nýttir, fáa Føroyar tá sín lutfalsliga part afturgoldnan í 2010? Sambært lógini fella pengarnir – eisini teir frá føroysku peningastovnunum – í danska statskassan.

**Avtøkufelagið høvuðsleiklut**

Danska búskaparmálaráðið setir á stovn eitt partafelag nevnt Avtøkufelagið. Sambært lógini er tað danska búskaparmálaráðið, sum eigur hetta partafelag. Føroyingar eiga sostatt ikki part í felagnum. Nevndin, sum verður vald at stýra felagnum, kemur at vera ein ómetaliga týdningarmikil nevnd, bæði meðan skipanin virkar, og ikki minst tá hon verður tikin av. Tí átti landsstýrið sjálvandi at tryggja sær møguleika at velja nevndarlimir, og soleiðis tryggja sær ávirkan.

Nevnda Avtøkufelag, kemur m.a. at peika á keypara, í teimum førum har peningastovnur ikki ber seg. Um ein føroyskur banki fær trupulleikar, er vandi sostatt fyri, at hann verður seldur útlendskum/donskum banka. Føroya Landsstýri - ella føroyskar fyritøkur – kunnu sostatt ikki fara inn og keypa bankan - uttan so at Avtøkufelagið hevur givið sítt vælsignilsi. Tað eru danska Fíggjareftirlitið og danski búskaparmálaráðharrin, sum hava síðsta orðið at skula hava sagt.

**Alt vald til danska Fíggjareftirlitið**

Fíggjareftirlitið kann fara beinleiðis inn at stýra bankunum, og kann eitt nú nokta bankunum at flyta kapital millum egnar fyritøkur. Tað kann eisini fara inn og seta nevndarlimir og stjórar frá. Danska fíggjareftirlitið hevur sostatt sera víðfevndar heimildir í okkara fíggjarkervi. Hetta er eitt øgiligt vald at lata øðrum, og eg vóni, at landsstýrið ger alt sum stendur í tess makt at tryggja okkum ávirkan her.

Nú hendan skipanin kemur at virka, er eingin ivi um, at tað fer at vaksa um áhugan hjá peningastovnum og øðrum at læna donskum (og føroyskum) bankum pengar. Tað er gott, men sum nevnt verður í donsku viðmerkingunum til lógina, so er samstundis ein greiður vandi fyri, at spekulerað verður í skipanini. Tí verður ymiskt gjørt fyri at byrgja upp fyri hesum.

Vit vita, at føroyskir bankar mest sannlíkt eru lutafallsliga betri fyri enn nógvir av teimum donsku og útlendsku bankunum, ið verða við í skipanini. Eiga vit ikki eisini at hava møguleika fyri at ávirka og byrgja fyri spekulatiónsvandanum?

Hetta eru nakrir av teimum spurningum, sum als ikki vóru nóg væl lýstir frá landsstýrisins síðu, áðrenn lógin varð samtykt.

**Kundu styrkt okkara støðu**

Tjóðveldi mælti saman við hinum andstøðuflokkunum til fleiri broytingar í lógini, júst fyri at tryggja føroysku áhugamálini betri. Broytingaruppskotini fullu tíverri.

Samstundis torir Edmund Joensen ikki at hugsa um avleiðingarnar, um vit yvirtaka fíggjarøkið. Eg tori ikki at hugsa um, at vit framhaldandi lata alla ábyrgd upp í hendurnar á øðrum.

Skuldi nakar ivast, so er Tjóðveldi framvegis fremsti forsprákari fyri at vit taka við ábyrgdini av okkara egna fíggjarkervi og sjálvi hava eftirlit við bankunum. Fegin í samstarvi við onnur lond. Vit eru als ikki nøgd við, at tað er danski búskaparmálaráðharrin - og ikki føroyski fíggjarmálaráðharrin - sum er fyrstur at fáa boðini frá Fíggjareftirlitinum um støðuna hjá føroysku bankunum.

# Grundøkir til Tórshavnar Kommunu!

HANS ANFINNSON NORÐFOSS

Valevni
Fólkaflokksins
X við lista A



Seinastu tíðina hevur alt ov lítið verið av útstykkingum til privat grundøkir í Tórshavnar Kommunu. Eg vil, um tú setur álitið á meg, arbeiða fyri at hettar verður raðfest høgt í kommununi.

Allar útsagnir sum hava verið um, at plásstrot er, hava einki við verðuleikan at gera. Tað er ríkiligt av plássi, um vit bert leggja okkum eftir at finna tey.

Tá nýggjar útstykkingar verða í Tórshavnar Kommunu, skal eisini leggjast upp fyri plássi til dagstovnar, grøn økir og viðurskiftir, sum kunnu økja um trivnaðin.

Eg vil virka fyri at vit fáa vanlig grundøkir á 400-500 m².

Saknar tú eisini hettar, so vel meg til býráðsvalið tann 11. nov 2008.